

## Havnin – fólk og yrki mest seld í 2008

Eitt yvirlit frá H. N. Jacobsens bókhandli vísir, at stórseljarin í desember mánaði varð Søtt og Leskiligt, sum Elisabeth Akursmørk og Jóhanna á Tjaldrafløtti hava givið út. Á 2. Plássi er Oddvørsa køku- og dessertdreymar, og á triðja plássi er Meg minnist og ørminnist eftir Heina Olsen. Frá fjórða til 10. Pláss hava bøkurnar plaserað seg soleiðis: Metusalem, Songbók Føroya Fólks, Spor í Tinganesi, Hin heimurin, Skakandi tilburðir, Westerbeek og Ein minnilig nátt. Mest seljandi bókin í 2008 varð Havnin – fólk og yrki 1940-1969 eftir Birgar Johannessen.

# Jógvan Hansen livir drey

**Hóast lítið hevur verið at hoyrt til Jógvan Hansen í seinastuni er hann enn høgt í metum í Íslandi. Fyri góðari viku síðan gjørdist hann piparsveinur, og varð tað hátíðarhildið við stíli, og 31. januar verður hann við í íslendsku Melodi Grand Prix kappingini**

SHOWBUSINESS

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*Myndir: Eggert Jóhannesson*



*Jógvan Hansen her saman við vertinum til Söngvakeppni Sjónvarpsins í ár, vinstrumegin og Hallu Williams, vertinum úr Xx Factor í 2007*

Síðan klaksvíkingurin Jógvan Hansen vann X Factor kappingina í Íslandi í 2007, hevur hann verið sera upptikin av tónleikinum. Men hóast fleiri fyrispurningar um at vera við í íslendska Melodi Grand Prixnum, kallað Söngvakeppni Sjónvarpsins, hevur hann ikki tikið av tilboðnum – fyrr enn nú.

Tann 18. desember varð hann nevnliga avdúkaður sum ein av luttakarunum til Söngvakeppni Sjónvarpsins, hvørs vinnari sleppur at umboða Ísland í Eurovision 2009, ið verður hildið í Moskva 16. mai í ár.

Tað verða hildin fýra undanumførð av Söngvakeppni Sjónvarpsins, og verður Jógvan við í tí seinasta av teimum, tann 31. januar. Tá skal hann kappast móti HARA systrunum, góðu vinkonurnar hjá honum, sum fingu hann við í X Factor í 2007, og sum blivu nummar tvey tá, umframt Hallu Williams, ið eisini var vertur til X Factor í 2007. Sostatt eru tvey av teimum trimum, hann skal kappast ímóti, sera góð vinfólk hjá Jógvani.

- Eg veit ikki um tað er lagnunar speisemi, ella onkur í spælir okkum eitt puss, at vit eru bólkaði saman. Í øllum førum verður tað stuttligt, greiðir Jógvan frá.

### Ein nýggjur kapittul

Síðan X Factor í 2007 hevur tað gingið sera væl hjá Jógvan Hansen.

- Beint eftir kappingina livir man líkasum av rómanum, men tað er eitt ting sum forsvinnur aftur. Soleiðis er tónleikur og popularitetur, nevnliga at tú ert inni nú og úti í morgin. Mann má duga at brúka tað, sum man hevur fingið, vísir Jógvan Hansen á.

Áðrenn Jógvan Hansen fór til Íslands, var hann longu vorðin kendur í Føroyum, millum annað við bólkinum Aria og sum ein av røddunum í Kularótum. Royndirnar úr Føroyum hava í øllum førum komið Jógvani væl við.

- Tey eru nógv, sum vinna eina stóra kapping, og so vita tey ikki meira. Tað sum eg kanska havi framum onnur er eina góða bakgrund úr Føroyum. Eg havi aldurin og erfaring av tónleikinum úr Føroyum, og tað havi eg kunna brúkt væl. Eg spæli tónleik hvørja viku, og tað er sum eitt arbeiði nummar tvey fyri meg, og tað er fantastiska stuttligt greiðir Jógvan frá.

Sjálvur sigur hann, at hann er ótrúliga heppin at kunna hava valið at luttaka í eini slíkari kapping, og at tað er eitt privilegium at sleppa at framføra eitt lag hjá einum, sum hevur skrivað so góð løg sum Hallgrímur Óskarsson.

### Øll í Íslandi fylgja við

Í Íslandi er Söngvakeppni Sjónvarpsins sera nógv umhildið, og sum heild fylgja íslendingar sera væl við í sendingini.

- Tá eg var í Føroyum, fylgdi eg við í danska Melodi Grand Prix onkuntíð, men tað var so tað. Soleiðis er tað vanliga millum føroyingar. Í Íslandi flenna tey kanska eitt sindur eftir tí, men kortini hava øll eina meining um tað, og tað er sera væl umtókt her, greiðir Jógvan Hansen frá.

### Hevur takkað nei áður

Til kappingina skal hann føra fram lagið »I think the world of you« hjá Hallgrími Óskarssyni, ið eisini skrivaði